»Vit eiga at gera norðurlendskar sjónvarpssendingar og stuðla framleiðsluni av okkara egnu videoframleiðslu til tess at kunna viga upp ímóti øllum tí, sum kemur inn á okkum uttanífrá«.

Reidun Berg
April 1985

av teirri norsku støðuni í løtuni og sum eg eri alt annað enn fegin um, sigur Reidun Berg og vísir til, at tey í Noregi hava givið loyvi til fleiri hundrað lokalar útvarpsstøðir.

— Eg haldi ikki, at hetta er rætta leiðin, tá sagt verður, at vit skulu hava størri kapping.

— Tað er einki dulsmál, at norska høgrastjórnin ynskir kapping — eisini á mentanarøkinum. Úrslitið av eini slíkari kapping verður ein elitumentan. Eg má viðganga, at síðani stjórnin gav loyvi til einar 300 nær-útvarpsstøðir hav: eg ongantíð hoyrt so nógv amatørútvarp, so eg haldi, at hetta er eitt sætt paradoks.

Monopol og javnvág

— Tú heldur sostatt ikki, at vandi er fyri einsrættan og minkandi góðsku við at hava eitt monopol?

— Tað haldi eg ikki hevur víst seg higartil. Eg haldi, at eitt alment monopol er tann einasti mátin at tryggja okkum eina javnvág á hesum so týdningarmikla økinum.

— Arbeiðir tú fyri eitt sjónvarp ella útvarp, sum ein privat fyritøka eigur, tá skal tú bert berjast fyri tess áhugamálum. Men arbeiðir tú innan tað almenna, so hevur tú reglar at halda teg til og hesar reglar skapa eina javnvág.

Viðari sigur hon, at skal ein reka slíka kapping í fjølmiðlunum, sum teir borgarligu eru so fegnir um, so verður tað gjørt út frá galluptølum, um hvussu nógv lurta eftir hesum og hasum programminum og als ikki eftir, hvat innihaldið snýr seg um. Hetta meti eg vera eina vandamikla leið.

Nokk við eini SV-støð í Føroyum

— Hvat vil tú ráða teimum føroysku sjónvarpsmyndugleikunum til í slíkum spurningi? Eiga vit at hava fleiri sjónvarpsstøðir?

— Nú kenni eg ikki nógv til tykkara viðurskifti, men spurningarnir eru helst teir somu alla staðni og skal eg siga mína hugsan, so haldi eg, at tit hava nokk við at hava eitt alment sjónvarp. Tit eiga at gera tað so dygdargott sum gjørligt, soleiðis at tað er nakað, sum fer at gagna teimum flestu.

Reidun Berg heldur eisini, at tað hevur stóran týdning, at føroyingar kunnu gera sínar egnu sjónvarpssendingar.

— Men heldur tú veruliga, at slíkar sendingar kunnu viga upp ímóti tí, sum kemur uttanífrá?

Ja, út frá tí, at fólk hóast alt eru upptikin av sínum egna umhvørvi og mentan.

Mentan á fíggjarlógirnar

Reidun Berg nemur síðani við spurningin:

peningur og mentan.

Hon vísir á, at vit hava eina felags norðurlendska mentan og eru vit ikki við til at seta pengar av til tess at varðveita hesa mentan, eitt nú við at gera sjónvarpssendingar, so fáa vit ongantíð sendingar frá okkara egna umhvørvi.

— Tað, sum hendir í Noregi í dag, er ein óhugnalig gongd, nevnliga hon, at teir almennu fjølmiðlarnir fáa ikki nokk av pengum til at gera nóg góðar sendingar.

— Eg havi kortini skilt á tær, at tú er ikki bangin fyri, at gongdin innan fjølmiðlarnar — serstakliga sjónvarp — skal fara at forkoma mentan okkara. Er tað rætt?

— Tað er rætt skilt. Eg beri ikki ótta fyri tí, um so er, at vit eru vitandi um tað, sum hendir. Vit mugu góðtaka tað, sum kemur inn á okkum uttanífrá. Eg haldi heldur ikki, at vit bara skulu siggja nakað negativt í tí. Vit mugu brúka tað til nakað positivt. Hetta kemur inn á okkum og má tí heldur vera ein stimbran til okkum sjálvi til tess at varðveita okkara egnu mentan.

Tað kann eisini gera, at vit fara at kenna størri ábyrgd fyri okkara norðurlendsku mentan.

Mentanin bindur okkum saman

Vit spurdu Reidun Berg, um norðurlendsku tjóðirnar hava dugað nóg væl at varðveita mentanararvin!

— Nú havi eg verið við í norðurlendskum samarbeiði í nógv ár, og eg haldi, at tað er mentanin sum bindur okkum saman. Hetta kenni eg eisini frá mínum arbeiði í europeiska musikráðnum, har eg havi umboðað Norðanlond. Har hoyrir ein oftani aðrar siga, at teir veruliga meta okkum sum eina eind. Teir vita, at vit standa fyri nøkrum felags málum og hesum øvunda teir okkum — og her er tað kanska ikki minst tað mentanar-politiska økið talan er um.

— Og, leggur Reidun aftrat, hetta er kanska júst so, tí at staturin í Norðanlondum hevur kent so stóra ábyrgd í eitt nú mentanarligum spurningum.

Mentan altíð síðst

Viðari sigur hon, at tað er ein almen ábyrgd at reka mentanararbeiði.

— Tá talan er um sosialverkið, um vegaverkið ella flutningstænastuna fyri bert at nevna nøkur dømi, so eru hesi ásett við lóg og er so og so nógvur peningur avsettur til tey á fíggjarlógunum. Men tá tað snýr seg um mentan, so eru ongar lógir og alt ov oftani ov fáir pengar.

Pengarnir verða býttir út, har lógarreglur eru fyri tí, og tá eingir pengar eru eftir, so verður tað sagt, at samfelagið hevur ikki ráð til at brúka pening uppá mentan.

— Eg vil halda, at vit kanska áttu at lógarfest nakað av tí mentan vit hava. Og her kemur tann almenna ábyrgdin inn í myndina.

— Lat meg undirstrika, at tað, sum hevur størst týdning, er at varðveita sín egna identitet.

Mentan gevur meira enn pengar

— Men heldur tú, at vit veruliga hava lyndi til at prioritera onnur øki framum mentan og kanska undirmeta týdningin av mentanini?

— Tað er tíanverri so, at fólk hugsa oftani bert um tað, sum gevur pengar av sær. Men eg trúgvi, at mong av okkum gloyma, at mentan gevur meira av sær, enn vit í veruleikanum geva okkum fær um.

— Hvat heldur tú er størsta forðingin fyri varðveitan og menning av mentanini í Norðanlondum.

— Tað eru teir spurningar vit longu hava nevnt. Hetta, sum høgrabylgjan hevur við sær, at alt skal vera kapping og profittur, alt skal løna seg upp á stytri sikt.

Sjálv haldi eg, at onganstaðni kanst tú fáa so nógv burtur úr fyri eina so lítla íløgu sum á tí mentanarliga økinum.

Elitukappingin

— Tú nevnir høgrabylgjuna. Er tað veruliga so, at vit kunnu skilja millum høgravend og vinstravend, tá tað snýr seg um at varðveita og menna okkara mentan í Norðanlondum?

— Ja, tað haldi eg. Fyri fólk á høgravonginum telur tað mest, hvør er tann besti og hvør vinnur. Har er tað elitukappingin, sum telur mest.

Reidun Berg vísir at enda á eina syrgiliga gongd, har mentanin nú skal boðast og koma fram við hjálp av ymsum sponsorum og heldur fyri, at í dag er tað so, at tað er vinnulívið, sum skal »bjarga« mentanarligum áhugamálum. Hetta er ein óhugnalig gongd. Heldur átti tað almenna at sæð týdningin í, at vit varðveita mentanina til eftirtíðina eisini.

jan

TEMA: Nye medier

Aftenposten • 4

Medie-Norge

Satellitt-TV-eksplosjon

MAÐUR HEVUR VANDAN VIÐ – SUM IKKI AKTAR KOYRISIÐ!

